ÍF-TB 1-0 (1-0):

# Dagsins mál bar fulla úrtøku við sær

**TB avrikið boðaði avgjørt ikki frá botnliði, sum bara sparkar burtur og annars goymir seg í egnum brotsteigi**

ÍF-TB

*Jóannes Hansen*




*Tað var mest í deyðbóltsstøðum, at vandi var á ferð, og tað var eisini eftir slíka, at ÍF fekk avgerandi málið*

Tað var summar í Fuglafirði sunnudagin. Stilli, sól og heiður himin, og harafturat kundu teir á heimaliðnum og viðhaldsfólkini, sum støðugt fjølgast og ivaleyst fara at verða uppaftur fleiri, nú tað gongur so væl, sóla sær í, at tað enn eina ferð eydnaðist at vinna tepurt.

Og tað var vorðið sum mál, ið bar trý stig við sær. Tveir minuttir undan steðginum hevði ÍF horna í høgru. Lagt varð høgt og væl innfyri. Bæði reyðir og strípútir royndu at vinna bóltin, sum dalaði niður einar tveir metrar uttanvert brotsteigin og eitt lítil vet til vinstru. Miðvallarin í vinstru, Rúni Elttør, legði seg 90 stig, høgdi til við vinstra beini, og bólturin fór sum ein eldkúla upp í nettakið aftanfyri sakleysa og annars stinna TB málverjan, Predrag Markovic.

ÍF málið broytti fyritreytirnar hjá báðum pørtum fullkomuliga, men tað bar ikki serligar broytingar í spælbýti og ferð við sær.

Undan málinum var tað TB, sum úrslitaliga var omaná. Gestirnir vóru heilt týðuliga nøgdir við málleysan javnleik. Tað sást eitt nú aftur í, at teir vildu hava ferðina at vera lága, og tað eydnaðist teimum fyri tað mesta í 1. hálvleiki. At tað eydnaðist komst eisini av, at TB vildi og megnaði at spæla í staðin fyri bara at medda so høgt og langt, sum tað bar til. Málverjin og teir fýra í aftastu røð dugdu væl at spæla, og teir fluttu seg longri fram, enn tað undanfarnu ferðirnar hevur verið sagt, at teir hava gjørt.

Í framrættaða partinum knípti tað hjá TB, sum líður undir, at Alexander Jovevic og Daniel Nyarko ikki kundu vera við, tí teir vóru skaddir. Men hóast tyngdin og dýpdin ikki var so stór, so hildu tvørámenninir alla tíðina høvdið kalt, og Allan Poulsen, Olivur Abrahamsen og onkrir aðrir vístu, at fótbóltsevnunum bilar einki.

### Ikki nóg gott tak

Fuglfirðingarnir vildu fegnir í 1. hálvleiki hava, at ferðin í spælinum vaks, men teir megnaðu tað ikki nóg væl til, at talan kundi gerast um vandamiklar gjøgnumbrotsstøður. Hóast teir høvdu bóltin nógv tann størsta partin av tíðini, so endaði tað ov ofta við, at teir mistu út av vøllinum ella til mótstøðumenn.

TB sá sínar møguleikar í deyðbóltsstøðum. Tá fluttu teir allar teir stóru menninar í verjuni fram í brotsteigin hjá mótstøðumonnunum. Tað bar vandamiklar støður við sær. Bæði í ÍF brotsteiginum, men so sanniliga eisini í hinum endanum, har tað fleiri ferðir eftir TB deyðbóltar knípti við uppbakkingini, tá ið ÍF fór í skjót mótálop.

Seinna partin av fyrra umfarinum vóru tvær tilíkar støður, og tað var í seinna førinum, at ÍF fekk sigursmálið. Í fyrra førinum var um reppið, at Óli Johannesen úr stuttari fjarstøðu og eftir TB horna fekk bóltin framvið Allani Joensen, sum bjargaði. Skjótt ÍF mótálop bar við sær, at Gunnar Nielsen gjørdist leysur, men TB málverjin bjargaði.

Í seinna førinum varð TB fríspark lagt í ÍF brotsteigin. TB verjuspælararnir vóru frammi, ÍF kontra bar vandamikla støðu og horna í høgru við sær, og so var tað, at Rúni Elttør legði til við fína heilfluktaranum, og harvið hevði ÍF tryggjað sær hálvleiksleiðsluna og týdningarmikla sinniliga yvirtakið í steðginum.

### Spenningurin helt sær

Beinanvegin eftir steðgin vóru ábendingar um, at tvørámenn ætlaðu at sleppa eitt vet í verjuni fyri at fáa størri tyngd í hinum endanum. Fuglfirðingar fingu harvið møguleikar í snarálopum, og bæði Sylla og Gunnar Nielsen høvdu møguleikar, uttan at teir bóru mál við sær. Serliga tá ið Gunnar Nielsen eftir innlegg úr høgru smekkaði til, vardi TB málverjin framúr væl við nærra stólpan.

Seinna partin av 2. hálvleiki broytti TB til 4-3-3. Zivkovic, Larbi og Hallur Christiansen vóru á toppinum, miðvallararnir vóru meiri framrættaðir, og síðstu fimm minuttirnar fór eisini Óli Johannesen fram í fremstu røð, men tað eydnaðist ikki TB at spæla seg til stórar møguleikar. Úti á vøllinum bæði dugdu og tordu teir at spæla, og teir fingu frið til tað, men á fremsta triðinginum av vøllinum vóru broddurin og tyngdin lítil og eingin.

Intensiteturin var einki serligur, men nervin var alla tíðina til staðar, tí tað ikki eydnaðist heimaliðnum at fáa mál burturúr onkrum møguleika og harvið at taka spenningin burtur.

## FAKTA UM DYSTIN

**ÍF-TB 1-0 (1-0)**
**1-0:** Rúni Elttør 43.
**Dómari:** Lassin Isaksen
**ÍF:** Allan Joensen — Eyðolvur R. Petersen, Poul Ennigarð, Bartal Eliasen, John Thomsen — Gunnar Nielsen, Símun Eliasen, Høgni Zachariassen, Rúni Elttør (Hanus Eliasen, 74.) — Sylla (Atli Petersen, 89.), Magni á Lakjuni (Áki Petersen, 85.)
**Gult kort:** Gunnar Nielsen
**TB:** Predrag Markovic — Predrag Zivkovic, Aca Petrovic, Óli Johannesen, Jón Johannesen — Búi Mortensen (Hallur Christiansen, 46.), Einar Petersen, Birgir Rasmussen, Olivur Abrahamsen (Mortan Enni, 75.) — Allan Poulsen (Magnus West, 69.), Emmanuel Larbi
**Gult kort:** eingin

# Eg minnist ikki hvussu eg gjørdi

**Málskjúttin ætlaði sær við serligum áhuga at síggja sigursmálið í sjónvarpinum mánakvøldið, tí hann var ikki heilt greiður yvir, hvussu hann bar seg at**

ÍF

*Jóannes Hansen*

Tað er sjáldan, at tað kemur fyri, at so fínt mál verður skorað, sum tað var, sum Rúni Elttør var meistari fyri í Fuglafirði sunnudagin.

*Hatta var vorðið sum mál?*

- Ja, eg haldi, at eg rakti bóltin orduliga væl, og at tað var nógv ferð í skotinum. So tað var orduliga deiligt, men eg veit satt at siga ikki sjálvur, hvussu eg bar meg at, so tað má eg hyggja væl eftir, tá ið málið fer at verða víst í sjónvarpinum, sigur fegni málskjúttin. Í fjør skoraði hann fýra ferðir, men hetta var fyrsta málið hjá honum í hesum kappingarárinum.

*Tað hevur gingið væl hjá tykkum í fyrsta partinum av kappingini?*

- Hetta er heilt hugaligt, og vit hava gott mót. Munurin millum í fjør og í ár er tann, at nú eru vit fleiri í kappingini um plássini. Tað hevur við sær, at tað ikki merkist so væl, sum tað gjørdi í fjør, um ein ella tveir spælarar eru burturi frá, tí teir eru skaddir ella leikbannaðir.

*Hvussu verður nú?*

- Í fyrstu atløgu eru vit sera spentir upp á fjórðingsfinaluna í steypakappingini, sum vit skulu spæla í Gundadali móti HB hósdagin. Vit trúgva upp á, at tað kann lata seg gera, og vit trívast væl við, at talan er um stóra avbjóðing, sigur klaksvíkiungurin, sum áður eisini hevur verið í B36, og sum sunnudagin skoraði fantastiska sigursmálið í Fuglafirði.

*Skulu vit rokna við fleiri sovornum málum í ár?*

- Tað verður sagt, at sovorðið eydnast bara eina ferð av hundrað ella færri ferðir enn so. Men eg fari at royna, um møguleikin verður til tað, og so fáa vit at síggja, hvussu tað fer at eydnast!

# Virðingin ov stór

**TB miðvallari heldur, at stóru fuglfirðingarnir gjørdu, at TB ikki gjørdist so vandamikið í deyðbóltsstøðum, sum teir ofta hava verið áður**

TB

*Jóannes Hansen*

Tvørámenn iðraðu seg um, at teir ikki megnaðu at fáa eitt stig við sær úr Fuglafirði. Men teir ásannaðu samstundis, at soleiðis sum tað tørnaði út, so skuldu teir havt fingið stigið við málleysum javnleiki. Tí í álopspartinum hevði TB einki at bjóða uppá.

- Í verjuni gekk væl hjá okkum. Málið var flott, men tað verður ikki á hvørjum degi, at sovorðið mál verður skorað. Í álopspartinum vóru vit ov tunnir. Tað var ikki fyrrenn síðst í 2. hálvleiki, at vit orduliga lupu á. Vit høvdu ov leingi ov stóra virðing fyri teimum, heldur TB miðvallarin Einar Petersen.

*Tit royndu at spæla og sparkaðu ikki nógv?*

- Venjarin vil ikki síggja, at vit sparka. Hann vil hava, at vit spæla fótbólt, og hvat tí viðvíkur var hetta ikki so galið, men vit hava trupulleikar, tá ið vit koma á mótstøðuhálvuna.

*Hvussu verður nú?*

- Vit hava gott mót, og vit rokna avgjørt við møguleikanum, tá ið vit sunnudagin fara at fáa vitjan av KÍ, sigur Einar Petersen.